# Danski sosialstaturin undir broyting

## Donsk ósemja um virði, samleika og um nationalismu í dag. Annar partur

SAMLEIKI

*Kim Simonsen*
*kimsimonsen@hotmail.com*

*"Sannkenningin av virðinum og týdninginum av okkara tjóðskaparyrking, sum hin mest sanni spegilin til fólksins hugsan, er á okkara døgum so vanlig, at hetta er ein fyritreyt hjá øllum, ið virða teirra tjóðskap. Tað er her, at vit síggja ta eind, har kreftir møtast og vinna týdning í søguni hjá mannaættini."*

**Svend Grundtvig 1843**

*»Tjóðskaparligur samleiki, sosialur samleiki, mentanarligur samleiki, persónligur samleiki — alt hetta tos um samleika ger meg í øðini.«*

**Jørgen Knudsen 2000**

**Vit eru von við, at mentunarlig rák eru komin úr Danmark. Spurningurin er, hvar og hvussu nógv borgaraliga stjórnin og danski mentunarbardagin um m.a. fólkaskúlan, ES og flóttafólk fara at ávirka fólk og mentan í Føroyum, nú danski sosialstaturin undir broyting.**

Føroyar vóru eitt danskt amt í øldir og Føroyar hava hoyrt til Danmark í meiri enn 600 ár, men mangan er tað sum um føroyingar hava eina sera blandaða vitan um hetta land, ið fyri ein part mest eru fordómar. Donsk søga er long, so nógv longri enn hin føroyska. Tað er áhugavert at lesa Procopius frá 550 skriva um danir: "Da herulerne, efter at være blevet besejrede af longobarderne i det ovenfor nævnte slag, udvandrede fra deres fædrene hjem, (ð) efter dernæst at have krydset en stor strækning af goldt land, kom de til varnierne, som de kaldtes. Efter disse passerede de danernes folk, uden at lide overlast fra barbarerne der." Seinni kunnu vit lesa í Bjovulf kvæðnum frá 700-talinum um danir: "Ja, vi har spurgt til spyd-daner før, folkekongers fylde i fortidens dage, hvordan heltene hentede hæder i kampen!" Seinni gjørdust danir kristnir, ið vit kunnu lesa um á stóra Jellinge-rúnasteininum: "Harald konge bød gøre dødeminde dette efter Gorm sin fader og efter Thorvi [Tyre] sin moder, den Harald, som [for] sig vandt al Danmark [*tanmark ala*] og Norge og gjorde danerne [*tani*] kristne".

Romantikkurin í Danmark sigst vardi frá umleið 1800 til 1870, men vit síggja nógv góðs varðveitt frá hesi tíð. Romantiska tíðarskeiðið er bæði ein ávísur háttur innan vestureuropeiska mentanarsøgu og ein ávísur háttur at uppliva sjálvan veruleikan. Romantiska øldin var ein sokallað idealistisk tíð, og ein tíð, tá modernaða menniskja kom til tilvit um egnar kenslur, sum vit kenna tað. Romantiska tíðarskeiðið hevði ein ótrúliga stóran týdning fyri øll fólkasløg í Europa, og tað er júst hetta, ið vit enn berjast um víða, eisini í Føroyum og í Danmark í dag. Romantikkurin var á ein hátt eitt aftursvar til tíðina, ið undan fór, ið vit av og á kalla rationalisuna ella upplýsingartíðin. Her var serliga tankin ráðandi um, at menniskjað við sínum viðfødda skili kundi læra um tey viðurskifti, teir sannleikar og tey prinsipp, ið mannalívið byggir á. Rationalistar vildu kritiskt kanna allan heimin. Serliga var álitið á menniskjans skynsemi avgerandi. Sannleikin skuldi sjálvur prógva, hvat var rætt og hvat var skeivt. Rationalisman hevði álit á tað skilvísa í menniskjanum og vildi tí frígera hin einstaka frá ómynduggerð. Týski heimspekingurin Immanuel Kant helt fyri, at: »Upplýsing er menniskjans frígerð frá tess sjálvvaldu ómynduggerð". Henda ómynduggerð er okkara vantandi evni at hugsa. Orsøkin er ikki vantandi vitan, men vantandi mót og viðtøkuføri. Hesi orð fevna um aðaltankarnar í rationalismuni, ið fingu stóran týdning fyri uppreisturin hjá jødiska intellektuella George Brandes mótvegis romantiskari hugsan. Seinni í 1920-unum skuldi hesin arvurin frá Kant og Brandes síggjast víða í mentanarradikalismuni, serliga í 1930-unum og í nýggjari tíð í nýradikalismuni undir ungdómsuppreistrinum um allan heim. Í Danmark fekk hesin rationelli andi so stórt vald, at nógvir serfrøðingar hava tosað um, at hesin bólkur hevur sigrað í 20. øld.

### Náttúran sum ein vera

Romatikkurin er ikki lættur at fata, men er næstan alt tað øvugta av tí rationella. Her er tað fyrst og fremst kenslurnar, idealisma og tankar um, at heimurin er allur ein sál, náttúran ein stór livandi vera, eitt alkosmos. Tað er ikki sørt, at William Heinesen av og á leggur á henda bógvin í sínum kosmiska ritverki. Romantikkurin er ein tilverutulking, ið gongur ímóti so at siga øllum teim upplýsingarhugsjónum og hugsanum um menniskjað, ið rationalisman heldur átt. Romantikkurin var tíðin, har vit sóu eina ekstrema individualismu. Ein tíð, har kenslurnar sluppu framat, men eisini tíðin fyri eina nýggja nationalistiska ideologi.

Longu 1700-tals heimspekingurin Rousseau fanst at okkara siðmentan, og í verkinum »Émilie« royndi hann at draga modernaðu individualismuna fram. Rousseau setti seg upp ímóti rationalismuni og t.d. Déscartes og Spinoza, tí hann vildi seta kenslur fram um hugsan: »At vera er tað sama sum at hava kenslur«, helt hann fyri.

Romantikkurin roynir at framala tað intuitiva og skapandi lyndið í einstaklinginum, og var tí bæði kollvelting og reint afturhald og ein kollvelting mótvegis íbornu skeptisismuni í rationalismuni, ið meinti, at tað, sum ikki kann standa royndina hjá skilinum, ikki skal góðtakast. Romatikkurin dyrkaði alt tað mótsatta av tí skilvísa — kenslur, mystikk, intuitión, dreym og alkymi.

Nýggja tjóðskaparliga mentanin skapti nýggja mentan, list og bókmentir. Alt var ein tjóðskaparligur spurningur, so at siga hvør málningur í Danmark um hetta mundið avmyndaði søgu dana og hevur t. d. ein gravheyggj sum motiv. Seinni, í t. d. Týsklandi og í Onglandi, komu minni hugnaligir tónar, har »Sturm und Drang«-hugsanin sást í listini sum melankolsk samanbrot, undirgangur, tap, longsul og veingjaskotin uppreistur. Tjóðskaparliga mentanarfatanin fekk søguna fram sum eina dimensjón, har rationalisman ikki í sama mun helt seg til søgufrøðina.

Týski filosoffurin Johan Gottfried Herder (1744-1803) var ávirkaður av uppgerð J. G. Hammanns við ensku rationalistisku heimspekina og t. d. skeptisismu David Humes. Hugsan Herders um list var ein samanhangandi hugsan um mál, sum niðurlagt í náttúru menniskjans, ið aftur er partur av søgufatanini. Bæði italiumaðurin Giambattista Vico og franskmaðurin Montesquieu høvdu arbeitt við hesi somu søgufatan í 18 øld., men tað var fyrst við Herder, at søgan fekk eina so stóra ávirkan. Søgan gjørdist alt, einki kundi skiljast, uttan at hetta skuldi skiljast søguliga. Henda historisma er í hæddini í romantikkinum og hjá filsoffinum G. W. F. Hegel. Hegel ávirkar mentanina í Vestureuropa og í Danmark, og tað eru somuleiðis hesir miðeuropeisku tankar, ið leggja lunnarnar undir eitt nú føroysku tjóðskaparrørsluna. Tankar, ið enn eru virknir.



*Tað, fólk innan mentanarradikala rákið eisini vildu, var at grundleggja eina frílynta kjakmentan, tí tað er ógjørligt at kjakast við ein fundamentalistiskan »frelstan« persón, ið dyrkar tjóðina ella aðra trúgv, sum tí gongur fram um alt. Møguliga stóð illa til á hesum økinum í Føroyum. Vit hava sjálvandi ikki so nógv fólk, ið kunnu taka sær av at kjakast ella av vanligari fólkaupplýsing. Tað er helst tí, at tað at royna at kjakast um ymisk mál í Føroyum mangan er púra ógjørligt, - tað er sum at royna at fáa ein trúgvandi fundamentalist at kjakast í staðin fyri at trúgva blint á t.d. samband ella loysing.*

### Biedermeier mentanin

Partar av romantisku mentanini verða ofta nevndir »biedermeiermentan«. Navnið Biedermeier er frá týskari mentanargransking og merkir hin vanligi miðalborgarin. Navnið Biedermeier kemur frá parodi Ludvig Eichroths frá 1853 av einum skúlalærara og hansara yrkingum í bókini: »Biedermaiers Liederlust«. Heimur Biedermeiers er Bíblian, antikku klassikararnir, Goethe, og so dámar honum at skriva smáar yrkingar. Biedermeiermentanin í Danmark er ein borgarligur lívsformur, sum blómar frá uml. 1825-1845, har tað trygga, kenda og harmoniska varð dyrkað, meðan alt annað var púra trokað burtur. Ikki er tað realisman, ið ræður, men ein útvaldur partur av heiminum. Donsku málararnir Eckersberg, Købke, Lundbye og Marstrand vísa okkum hesa biedermeiermentan í greinarmyndum og fólkalívsmyndum. Biedermeiermentanin vil knýta saman tað fagurfrøðisliga og tað etiska, eins og vit finna tað hjá tjóðaryrkjaranum á døgum Oehlenschlägers. Filosofiskt er mentanin merkt av tamarhaldi, og tankar um materialismu og nihilismu verða ikki toldir. Smakurin innan bókmentir eru romansir, fablar, ævintýr, skemtileikir, sálmar og vaudevillur. Kendast er Heibergsa: »Elverhøj« (1828). Hetta tíðarskeið er áhugavert, tí hesi rák fáa stóra ávirkan á føroyska mentan, t.d. helt Kristin í Geil fyri um føroyska sjálvstýrismannaheim, at tey líktust biedermeierheiminum og enn einaferð var hetta rák og eisini tað meiri radikala sum Kristin sjálvur helt seg til, komin raplandi úr Danmark.

Í romantikkinum finst eisini ein sonevnd romantisma, ið er meiri fylt við andstygd. Romantisman sæst í donskum bókmentum eitt nú hjá Aarestrup, Bagger, Paludan-Müller, Søren Kierkegaard og H. C. Andersen. Bókmentafrøðingurin og yrkjarin P. L. Møller verður mangan settur í samband við romantismuna, tí hann vildi bróta tabu, sum t. d. at skriva um tað erotiska. Hann fekk undir síni lestrartíð og á Regensen eitt ringt orð á seg. Serliga Søren Kierkegaard var ein svorin óvinur. Kierkegaard brúkar persónin P. L. Møller sum støði undir persóninum Johannes forføreren í kendu bókini »Forførerens dagbog«. Hetta er millum annað at lesa í bókini hjá Henrik Stangerup: »Det er svært at dø i Dieppe«, ið er um P. L. Møller. Stangerup skrivar sína framúrskarandi triologi um tað estetiska, etiska og tað kristna støðið í lívinum, ið hann finnur í stóru tonkunum hjá Kierkegaard. Hesi »stadier på livets vej« íklæðir Stangerup síðani veruligar persónar, fyrst estetikaran P.L. Møller og síðani bókina um danska náttúruvísindamannin Peter Wilhelm Lund: »Vejen til Lagoa Santa« og bókina: »Broder Jacob«, um ein danskan munk.



*Romatikkurin er ikki lættur at fata, men er næstan alt tað øvugta av tí rationella. Her er tað fyrst og fremst kenslurnar, idealisma og tankar um, at heimurin er allur ein sál, náttúran ein stór livandi vera, eitt alkosmos. Tað er ikki sørt, at William Heinesen av og á leggur á henda bógvin í sínum kosmiska ritverki*

### Upplýsing og kjak

Hjá Kant og í rationalismuni annars vóru tað mýturnar, dogmur og ótti, ið skuldu berjast niður. Ein av hesum stóru alfevnandi mytum vóru tjóðskaparligu myturnar og tjóðskaparkenslur. Rationalistiska mentanarradikalisman kom tí at geva serliga nationalismuni eitt ringt orð á seg. Tað, fólk innan mentanarradikala rákið eisini vildu, var at grundleggja eina frílynta kjakmentan, tí tað er t. d. ógjørligt at kjakast við ein fundamentalistiskan »frelstan« persón, ið dyrkar t. d. tjóðina ella aðra trúgv, ið tí gongur fram um alt. Møguliga stóð illa til á hesum økinum í Føroyum. Vit hava sjálvandi ikki so nógv fólk, ið kunnu taka sær av at kjakast ella av vanligari fólkaupplýsing. Tað er helst tí, at tað at royna at kjakast um ymisk mál í Føroyum mangan er púra ógjørligt, tað er sum at royna at fáa ein trúgvandi fundamentalist at kjakast í staðin fyri at trúgva blint á t.d. samband ella loysing. Hesar kenslur fyri málinum eru púra eirindaleysar. Málið kemur áðrenn kjak, áðrenn menniskjað. Sjálvt um tú setir ein slíkan persón fastan og vísir á fleiri hundrað góð argument, so er einki at gera. Tá skilið stendur framman fyri trúgv, má allur logikkur gevast. Fornuftur er blástur av landi sum sápubløðran hjá tí hálovaða Jóannes Patursson. Umráðandi er at hava í huga, at skilið eisini er seinasti skansin, áðrenn meiningsloysi og etniska fólkatýning.

Tjóðin er eitt nýtt hugskot, ein nýggjur tanki og eitt gjørt rák, meðan rationaliteturin hevur bygt heimin og skapt fyrstu civilisatiónirnar í heiminum, og er tí týdningarmesti parturin av okkara viðfødda lyndi.

### Danskar tjóðskaparkenslur og mentanarradikalisman

"I Danmark skal det danske have positiv særbehandling. Selvfølgelig. Alt andet er at kaste vrag på kulturen. Hvis man vil have en kulturelt forankret politik, så kan den ikke være kulturelt ligestillet mellem det danske og det udenlandske (ð). Derfor siger jeg, at al den tale om kulturlighed og religionslighed — det er nonsens. De kulturradikale, der ønsker kulturlighed og religionslighed, de kan ikke have tænkt sig om. Danmark er nu engang et dansk samfund. Det er danskerne, der bestemmer i Danmark.."

**Bertel Haarder innanríkisráðharri 2002**

Undir kreppum og ágangi á tjóðina vaksa tjóðskaparkenslurnar. Soleiðis var undir øðrum heimsbardaga í Danmark og soleiðis er tað eisini í dag. Fólk møttust tá á stevnum at syngja sangir um tjóðina og fólkið. Mótstøðumenninir kallaðu sínar ólógligu bólkar t. d. »Holger Danske«. Í dag hava stórir politiskir flokkar sum Venstre og Konservativt Folkeparti nærum yvirtikið nationalismuna hjá t.d. Dansk Folkeparti. At hoyra Bertel Haarder er reint retoriskt ikki nógv øðrvísi enn at hoyra nationalistin Søren Krarup ella at lesa Svend Grundtvig frá 1843. Í dag er tjóðskaparliga eindin ikki hótt, hon er horvin í eini stórari pluralisering, sum granskarin Hans Hauge tók til herfyri í bókini "Post-Danmark – Politik og æstetik hinsides det nationale". Hesa bók vil eg viðgera í næsta parti.

*Bjovulf*
*Jellingestenen*
*Procopius, De Bello VI.15.1-4; 27-29*
*Svend Grundtvig 1843 Ind1æg i Dansk Folkeblad, 8.12. 1843. Genoptr. DIH Kildebind s.36*
*Jørgen Knudsen frá greinasavnið frá 2000*
*Carl Henrik Koch: Den europæiske filosofis historie —Fra reformation til oplysningstiden. 1983*
*Dansk Litetraturhistorie. 1746-1807. 1983*
*Georg Brandes, Immanuel Kant*
*Bertel Haarder Kristeligt Dagblad 7.12. 2001 og Weekendavisen 1.3.2002.*



*At hoyra Bertel Haarder er reint retoriskt ikki nógv øðrvísi enn at hoyra nationalistin Søren Krarup ella at lesa Svend Grundtvig frá 1843*